# Toyota Prius II
## – Ársins bilur í Evropa 2005

**Ein dómsnevnd samansett av 58 motorjournalistum í Evropa hava kosið Toyota Prius II til Ársins bil í Evropa 2005. Prius er einum av heimsins mest framkomnu og umhvørvisvinarligu bilum**


*Toyota Prius II er kosin »Ársins bilur í Evropa 2005«. Toyota er av tí fatan, at hybridtøknin er eitt tað mest realistiska boðið uppá ein optimalan umhvørvisvinarligan familjubil.*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Oman á allan heiðurin hybridbilurin Toyota Prius hevur fingið síðan hann kom til Evropa fyrr í ár, er hann nú eisini kosin »Ársins bilur í Evropa 2005« av eini dómsnevnd hjá »European Car of the Year«.

Millum teir sjey bilarnar ið komu í finaluna, fekk Toyota Prius II heili 406 stig og vann sostatt ein greiðan sigur.

Toyota Prius er heimsins fyrsti hópframleiddi hybridbilur, ið verður drivin av tveimum ymiskum motorum – einum bensin- og einum el-motori.

Battaríini geva streym til el-motorin og verða lødd upp av bensinmotorinum.

Hybridkonseptið virkar soleiðis, at bensinmotorurin og el-motorurin supplera hvønn annan og syrgja fyri at bilurin altíð koyrir optimalt, bæði hvat kraft, økonomi og umhvørvisvernd viðvíkur.

Í tíðindaskrivi frá Toyota verður sagt, at heiðurin er ein varði á vegnum til at góðkenna hybridtøknina sum »vanliga« tøkni í framtíðini.

Við skipanini »Toyota Hybrid Synergy Drive« gongur Toyota nýggjar leiðir við at skapa tann ultimativa ECO-bilin.

Toyota er av tí fatan, at hybridtøknin er eitt tað mest realistiska boðið uppá ein optimalan umhvørvisvinarligan familjubil.

## Renault og Samsung



Renault hava ætlanir um at økja virksemið á suðurkoreanska Samsung bilverksmiðjuni, sum teir yvirtóku í 2000. Ætlanin er at útflyta Samsung bilarnar til restina av heiminum um nøkur ár, segði Renault stjórin Louis Schweitzer, tá nýggjasti Samsung SM7 varð frumsýndur

*Kelda: Motor Magasinet*

## Opel jólaheilsan



Opel leiðslan í Týsklandi hevur verið á parkeringsplássunum kring tær ymisku Opel-verksmiðjurnar og kannað hvørjum bilmerkjum teirra starvsfólk koyra við. Leiðslan sendi síðan starvsfólkunum eina jólaheilsan við einum góðum tilboði upp á ein nýggjan Opel

*Kelda: Motor Magasinet*

## RR stevnir PR-Chokolade




Rolls Royce verksmiðjan stevnir í hesum døgum donsku sjokulátuverksmiðjuni PR-Chokolade í Kolding fyri ógrundað at brúka teirra logo við stavunum PR í staðin fyri RR

*Kelda: Motor Magasinet*





Virkisleiðari

P/F United Seafood søkir eftir virkisleiðara til virkið á Toftum. Virkisleiðarin skal hava ábyrgd av framleiðslu, rakstri, menning og umsiting av virkinum á Toftum. Virkisleiðarin luttekur aktivt í søluarbeiðinum. Virkisleiðarin myndar virkið úteftir.

P/F United Seafood Toftir framleiður saltfisk. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigi. Arbeiðið á United Seafood Toftir fer fram sambært innaneftirlitsskipan. Í 2003 virkaði virkið uml. 7.000 tons av rávøru.

Uppgávurnar hjá virkisleiðarinum verða m.a.

- Leiða arbeiði á United Seafood Toftir
- Gera dag- og vikuroknskapir
- Gera rakstrarætlan.
- Samstarv við søludeild og samskifti við keyparar av vørunum.
- Samstarv um keyp av rávøru.
- Samstarv við høvuðsleiðslu og aðrar virkisleiðarar.

Ynskiligt er at umsøkjarin hevur hesar førleikar

- Relevanta útbúgving á passandi støði.
- Kunnleika til og royndir innan framleiðslu av fiski.
- Leiðslueginleikar.
- Góðan málkunnleika.
- Góð samstarvs- og kommunkatiónsevni.

Vit kunna bjóða eitt arbeiði í mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum. Lønina tosa vit um.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknarfreistin er 2. januar 2005.

Møguligir umsøkjarar kunna seta seg í samband við:

UNITED SEAFOOD, P/F Føroya Fiskavirking
att: Meinhard Jacobsen ella Leivur Michelsen
Postboks 218
FO-110 Tórshavn, Føroyar
Tel +298 35 55 55
Fax +298 35 55 50

REPROZ

UNITED seafood "Fish products from pristine waters"